# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðing



*18. nov 2004 fingu Mirjam R. og Marni Olsen, bæði úr Tórshavn, tvíburðar. Tveir dreingir. Annar vigaði 2800 g og var 49 cm langur og hin 2300 g og var 47 cm langur. Teir hava fingið navn og eita Heðin og Hjalti.*

18. november fingu Maiken og Remi Hammer, Hvalba, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4050 gr.

18. november fekk Brynhild Lisberg, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigðaði 3540 gr.

18. november fingu Randi Simonsen og Karsten Jespersen, Norðdepli, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3100 gr.

19. november fingu Hanna og Hilmar Sam Lamhauge, Glyvrum, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2900 gr.

19. november fingu Esther og Sveinur Thomasen, Miðvági, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4500 gr.

19. november fingu Katrin og Magni á Lakjuni, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4725 gr.

20. november fingu Magnhild Midjord og Jónleif Bólstein, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3500 gr.

20. november fingu Durita Johansen og Hans Jákup Andreasen, Streymnesi, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3500 gr.

20. november fingu Durita á Heygum og Jákup Andreas Lamhauge, Vestmanna, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4250 gr.

22. november fingu Andrias Højgaard og Sigrun Jógvansdóttir Hansen, Toftum, ein son. Hann var 45 cm langur og vigaði 2650 gr.

22. november fingu Bergljót og Hans Vang, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3950 gr.

24. november fingu Anna Joensen, Toftum, og Jónhard Joensen, Strondum, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3015 gr.

24. november fingu Svanna og Livar Nysted, Hvannasundi, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3900 gr.

25. november fingu Marjun og Artur Johansen, Strondum, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3600 gr.

25. november fingu Sóley Mikkelsen og Jógvan Sigurd Poulsen, Skála, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

## Hjørdis og Oddfríður Gregersen gullbrúdleyp



Í dag, 27. november 2004, kunnu hjúnini Hjørdis og Oddfríður Gregersen í Syðrugøtu halda gullbrúdleyp.

Tey vóru vígd í Fuglafjarðar kirkju tann 27. november 1954 og brúdleypið varð hildið í "Tip Top". Tey fóru at ganga saman síðst í 1951.

Hjørdis Sofia Gregersen er dóttir Petru Petersen f. Magnussen, ættað úr Kollafirði og Sámal Petur Petersen úr Fuglafirði. Hjørdis, sum vaks upp í Fuglafirði, er født 22. mars 1928 og er sostatt 76 ár.

Oddfríður Gregersen er sonur Sáru Gregersen, f. Simonsen, ættað úr Norðragøtu og Jóan Paula Gregersen úr Syðrugøtu. Oddfríður vaks upp í Syðrugøtu og er føddur 1. februar 1928 og er eisini 76 ára gamal.

Bæði vuksu tey upp í heimum har fiskivinna og handil merktu gerandisdagin. Í Fuglafirði varð nógv reiðaravirksemi umframt handil og í Gøtu var fiskavirki, útróður og annað vinnuligt virksemi.

Hesin uppvøkstur hevur uttan iva sett dám á teirra lív. Í øll 50 árini, tey hava livað saman, er inntøkan komin úr sjónum, og altíð úr virksemi har Oddfríður sjálvur var arbeiðsgevari.

Hjørdis arbeiddi í nógv ár á skrivstovuni og fekst mest við at avrokna manningarnar á skipunum.

Samanumtikið kann sigast, at tey hava havt eitt gott og spennandi lív saman, tó at onkuntíð hevur leikað á tá úrtøkan úr virkseminum ikki gav eftir vild. Hesar truplu tíðir vunnu tey tó altíð á saman, og sigast má at væl er virkað, tá ein hugsar um eitt gullbrúðarpar við so stórari lívsgleði og lívsneista.

Hjørdis gekk í Preliminerskúla í Havn frá 1943-45 og síðan gekk leiðin til Danmarkar á handilsskúla. Eftir lokna útbúgving í 1947 hevði hon ymisk skrivstovustørv í Danmark, eitt nú hjá Dansk Esso.

Eftir barnaskúlan og aftaná krígslok fór Oddfríður til skips við sluppini Boðasteinur og seinni við koltrolaranum Krossteinur.

1948/49 var hann við skúlaskipinum "Danmark", og seinni var hann stýrimaður við skúlaskipinum " Georg Stage".

Áðrenn hann í 1950 fór á stýrimansskúla í Havn, var hann eisini við m.a. Kyrjasteini og Jóannes Patursson.

Endaliga skipsføraraútbúgving var tikin í Keypmannahavn í juni 1953.

Hjørdis og Oddfríður, sum tá búðu saman, avgjørdu at koma heim til Føroyar í 1954 at seta búgv.

Tey búðu í Fuglafirði til 1964, tá flutt var í nýbygd hús í Syðrugøtu.

Tey eiga 3 synir. Atli er føddur í 1956, Páll í 1959 og Regin í 1963.

Tilsamans eru 9 ommu- og abbabørn og 1 langommu- og langabbabarn.

Tey síðstu 50árini hava øll verið merkt av stórum og skiftandi vinnuvirksemi.

Umframt virksemi á Fiskavirkinum, sum var stovnað í 1929, var fiskamjølsverksmiðjan Fiskamjøl stovnað í 1954, nótabáturin Saturn var keyptur í 1964, sildavirkið Harenga var stovnað í 1970, íðnaðarskipið Sporið kom til landið fyrst í 70-unum, saltfiskavirksemið byrjaði í 1980, laksaaling í 1982, umframt annað virksemi.

Oddfríður hevur umframt tað vinnuliga virksemi, eisini havt stóran áhuga í politikki og samfelagsviðurskiftum annars.

Hann sat í Gøtu kommunu frá 1970 til 1984. Hann var formaður øll árini.

Fleiri kenna hann frá Føroya Abeiðsgevarafelag, har hann var í nevndini frá 1968 til 1993. Hann var formaður síðstu 11 árini.

Heimið í Syðrugøtu hevur verið ein tryggur karmur um uppvøksturin hjá synunum og hevur altíð staðið opið fyri familju og vinum. Hvør minnist ikki 2. jólakvøld tey síðstu mongu árini, har øll familjan í báðar ættir møtist til hugna og góðan mat. Vónandi orka tey at halda fram í nógv ár afturat við hesum tiltaki.

Dagurin verður hildin saman við børnunum við familju og systkjum.

## Gullbrúdleyp

Sunnudagin 28. november hava hjúnini Nanny og Kjartan Nielsen, Saltangará, gullbrúdleyp. Opið hús verður í húsunum hjá eldrafelagnum Nón, Torvgøta 2, Runavík, frá kl. 13.00-18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Dagurin

**27. november. Facundus**. Var úr Leon í Spaniu, deyður umleið ár 300. Hann og ein bróðir hansara vórðu tiknir av døgum við ánna Ceia í Calisiu í Norðurspaniu.

**28. november. Gunter**. Teir vita ikki við vissu, hvønn meint verður við. Hann stóð í halgimannatali tíðliga í tíðini, fór burturúr, men kom so seinni aftur. Teir halda tó, at hesin Gunter ella Gunterus hevur verið navnframur biskupur í Týsklandi, sum doyði í 1045, 90 ára gamal.

**29. november. Saturninus**. Fleiri halgimenni við hesum navni eru knýttir at degnum, men helst halda teir talan vera um fyrsta kristna biskupin í Toulouse í Fraklandi, sum varð tikin av døgum um ár 257. Á grøv hansara er umleið ár 1100 bygd prýðilig kirkja, sum í miðøld var nógv vitjað av pílagrímum.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Meinhardt hjá Bil-Óla 80 ár



Leygardagin 27. november verður havnarmaðurin Meinhardt Arge 80 ár.

Meinhardt var føddur í 1924 og sleit barnaskógvarnar í Tróndargøtu við Rabarbukvarterið í Havn. Foreldrini vóru Malla Johannesen, ættað úr Vestmanna og Óli Arge, ættaður av Argjum. Systkini vóru fimm í tali, Niels Juel, Hanna, Meinhardt, Johannes (Hannis) og Maria. Brøðurnir eru farnir, meðan systrarnar liva enn.

Tá lærutíðin á Líknarráðnum var av, fór Meinhardt í Sjóvinnubankan, har hann millum annað arbeiddi undir Torsteini Petersen, Sølvsten og Rasmusi Olsen. Eftir 18 ár í Sjóvinnubankanum gjørdist hann bókhaldari hjá S.H.J. Radiohandil hálvan dag, meðan hann brúkti restina av arbeiðstíðini í virkinum hjá pápanum í Gundadali, har lunnar vóru lagdir undir verkstaðið og bilasøluna Auto Service.

Meinhardt giftist í 1948 við Onnu-Lisu, sum kom úr Skive í Jútlandi. Tey bygdu í Fríðrik Petersensgøtu og fingu børnini Inger, Gunnleyg Finnboga og Árna, sum øll búgva í Havn uttan Gunnleyg, sum býr á Fredriksberg. Lisa doyði í 1982. Nøkur ár seinni giftist Meinhardt uppaftur við Tóru Frisdahl, og bygdu tey úti í Havnardali.

Á ungum árum var Meinhardt kendur fyri sítt góða fótbóltsspæl. Longu 14 ára gamal spældi hann á 1. liði hjá HB, og seinni kom hann á landsliðið. Tá hann fylti 24 ár í 1948, skrivaði Ítróttartíðindini soleiðis:

"Í øðrum londum er tað so, at ítróttarmenn ella -kvinnur, sum skara fram úr, vita, at ikki bert allir limir innan felag teirra men hópur av ítróttahugaðum fólki kring landið fylgja teimum í huganum við góðum ynskjum, verja teir í kjaki, ferðast langar leiðir fyri at síggja sín mann, standa í troki fyri at fáa hendur á ítróttarbløðini so síggjast kann, hvat onnur halda um teirra "favorit" o.s.f.v. Hetta er tað, ið nevnt verður stjørnudyrkan, og sum er skaðiligt, tá ov nógv verður gjørt av. Vist er tó tað, at hesin sami, sum veit, hvussu nógv menniskju hava álit á honum, hann eirir sær ikki -ger sítt allrabesta hvørja ferð - hann kennir ábyrgdina.

Henda "dyrkan" er at kalla ókend hjá okkum.

Kortini kunnu vit ikki nokta, at Havnin er í tvíningum - onnur helvtin fyri HB, hin fyri B36.

Einstakilingar verða ikki "dyrkaðir" her hjá okkum, men Meinhardt Arge er um at vera eitt undantak. Hann skarar somikið fram úr við sínum bóltkunnleika, fintum og treystleika, at skilafólk úr báðum áður nevndu bólkum fylgja honum á leikvøllum og frøast, sama gera útlendingar, ið bera eyga við leik hansara. Meinhardt verður 27. november 24 ár, og vit ynskja honum og HB til lukku og mong góð ár enn á leikvøllum."

Meinhardt gjørdist undangongumaður innan føroyskt bilvirksemi. Tað eydnaðist honum saman við pápanum at flyta fyrsta japanska bilin yvirhøvur inn til Norðanlond. Bilurin var ein Prince Skyline, sum kom til Føroya í 1962. Hetta var áðrenn verksmiðjan fekk navnið Datsun. Í dag eitur verksmiðjan Nissan.

Meinhardt yvirtók Auto-Service í 1978 og flutti virksemið niðan á Háls. Virksemið vaks skjótt, og neyðugt var longu í 1982 at byggja út. Í 1985 seldi hann fyritøkuna til synirnar. Stutt eftir komu kreppuárini, og hevði hetta við sær stórar broytingar. Í dag rekur elsti sonurin bilfyritøkuna, sum heldur til við Oyggjarvegin. Fyritøkan eitur P/F Meinhardt Arge.

Meinhardt hevði sína dagligu gongd á virkinum til fyri nøkrum árum síðani. Seinnu árini hevur hann brúkt nógva tíð uppá ættargransking og føroyska bilsøgu, sum hann partvíst hevur fest á blað.

Frá barnsbeini hevur hann havt serligan áhuga fyri seyðarhaldi. Síðani sekstiárini hevur hann eisini havt trøð í Havnardali, sum hann framvegis hevur stóra gleði av. Tey seinnu árini er hon røkt saman við yngsta soninum, Árna.

Dagurin verður hildin saman við nærmastu familjuni.

## Magdalena Olsen 75 ár



Týsdagin 30. november fyllir Magdalena Olsen, vanliga nevnd Kellan, í Klaksvík, 75 ár.

Foreldur hennara vóru Henrikka og Theodor Askham. Tey vóru átta systkin, harav trý eru á lívi: Bergtóra, Helvig og Kellan.

Kellan giftist til Árna-fjarðar við Hans Andreas Olsen, skipara. Tey eiga fimm børn: Olivar, Henrikka, Kristoffur, Theodor og Lena. 23 ommu- og abbabørn, og 5 langommu- og langabbabørn eiga tey eisini.

Kellan var fyri tað mesta aleina við børnunum, meðan tey vóru smá, tí maðurin var til sjós, men hon hevði mammu sína búgvandi inni og vermammuna við síðuna av, so tær hjálptust at.

Kellan arbeiddi í nøkur ár á flakavirkinum í Árnafirði, síðan á bakaríinum hjá Werner og í mong ár vóru hon og maðurin virkin á Solo Deo Gloria við teirra hjálpsemi og trúfesti.

Síðan maðurin gjørdist sjúkur og óhjálpin, og er fluttur inn á Sambýlið í Klaksvík, hevur Kellan selt heimið í Árnafirði og er flutt til Klaksvíkar, fyri at vera nærri manninum.

Vit ynskja Kelluni hjartaliga tilukku og ein góðan dag, og Guðs ríku signing í framtíðini.

x.

## Odvør á Lakjuni 50 ár



Í morgin, sunnudagin 28. november, verður Odvør á Lakjuni í Fuglafirði 50 ár. Odvør er ættað úr Havnini, men seinastu 27 árini hevur hon búð í Fuglafirði.

Odvør er dóttir Herborg og Gunnar Gunnarson, sum búðu í Mattalág. Hon var av Viðareiði og hann úr Vági. Tey áttu fimm børn: Sólva, sum býr í Esbjerg, Inga og Jórun búgva í Havnini, Gunnar býr í Klaksvík, og Odvør býr í Fuglafirði.

Sum ung arbeiddi Odvør í vøggustovu í Havnini. Eftir at hon kom til Fuglafirðar, hevur Odvør fingist nógv við seyming av ymiskum slagi. Hon hevur tikið skeið, og hon hevur hildið skeið. Eitt núð hevur hon havt vikuskiftisskeið í ymsum plássum, og so hevur hon eisini undirvíst í kvøldskúlanum.

Odvør er við síni vinnandi medferð ein av teimum drívandi í Fuglafjarðar Heimavirkisfelag, sum hevur útsølu í Piddasa handli. Talan er um rættuliga virknan felagsskap, sum selur fyri fleiri, ið gera handarbeiði heima við hús. Í Ribarhúsi, sum var pakkhúsið hjá Piddasa handli, skipa tey fyri listaframsýningum av ymsum slagi, og Odvør er eisini uppi í tí áhugabólkinum.

6. august í 1976 giftist Odvør við Jógvani á Lakjuni úr Fuglafirði. Tá gekk hann á læraraskúla í Havnini. Hann var liðugur í 1977, og tá fluttu tey til Fuglafirðar at búgva, og har hava tey verið síðani. Odvør og Jógvan eiga fimm børn: Høgni, Bárður, Rógvi, Herborg og Dánjal. Høgni er giftur og býr í Fuglafirði, og Bárður er giftur í Leirvík, har hann býr. Odvør eigur fýra ommubørn - triggjar gentur og ein drong.

## Andlát

18. november
Margretha Arge Andreassen, vanliga nevnd Gugga, Vestmanna, 72 ár
Thomasia Kjærbo, Sumba, 91 ár.

19. november
Jacobina Nysted Danielsen, Kvívík, 95 ár.

20. november
Anja Møller Larsen í Horsens, 42 ár.

21. november
Janus í Gong, Tórshavn, 57 ár.

23. november
Andrea Larsen, fødd Joensen, ættað úr Sørvági, búsitandi í Roskilde, 89 ár.
Ásmund Thomsen, Norðagøta, 85 ár.

## Prógv

Guðrun Margretha Johannesen, Tórshavn, hevur tann 25. november lokið prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur frá Viborg Sygeplejeskole.